Tit ringja — vit skriva
Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!

tíðindablaðið **sosialurin**

Lýsingar:
Lýsingarmaður okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingaspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran.

Arbeiði í boði í sjey londum

Norrøna felagið leitar nú eftir arbeiði í Føroyum til nøkur ungfólk úr hinum Norðurlondunum.

Føroyar eru komnar við í tiltakið Nordjobb, sum í summar ætlar at útvega 2.000 fólkum arbeiði í einum øðrum Norðurlandi. Úr Føroyum sleppa millum fimm og tíggju við og higar skulu so koma eins nógv úr hinum londunum.

Tiltakið, sum byrjaði í fjør við góðari undirtøku bæði hjá teimum ungu og arbeiðsgevarunum, er fyri fólk, sum 1. juni í ár eru fylt 18, men ikki 26.

Arbeiðstiðin er frá 1. juni til 1. ella 15. september. Ongin arbeiðir tó alla hesa tíðina. Fýra vikur er stytsta tíðin og tað longsta er tíggju vikur. Vanligt er, at fólk arbeiða seks ella átta vikur.

Tey ungfólk, sum hava hug at arbeiða í Danmark, Svøriki, Noregi, Íslandi, Grønlandi, Finnlandi ella Álandi í summar, eiga skjótast gjørligt at venda sær til Norröna felagið, tlf. 13081. Hagar kunna eisini arbeiðsgevarar, sum vilja hava ung úr hesum sjey londunum í arbeiði summar, venda sær.

hd

Nordjobb

Nordjobb vil hava nógv at vita um tey, sum søkja. Hetta er umsóknarblaðið, sum fæst frá Norröna felagnum, tlf. 13081.

Søknad om Nordjobb-86 / Nordjobb-86, hakemus

Etternavn / Sukunimi — Fornavn / Etunimet — Fødselsdato og -år / Syntymäpäikka ja -aika

Adresse: Gate/vei, nr. / Osoite: Katu — Postnummer, poststed / Postinumero, paikkakunta — Land / Maa

Telefon / Puh. — Statsborgerskap (medborgerskap) / Kansalaisuus

I nødsfalle tar man kontakt med: (navn, adresse, tlf.) / Hätätapauksissa lähin omainen (nimi, osoite, puh.)

Helsemessige vanskeligheter (arbeidshinder) / Sairauksia

Allergier / Allergia ☐ — Nedsatt syn (briller/kontaktlinser) / Heikentynyt näkö ☐ — Nedsatt hørsel / Heikentynyt kuulo ☐ — Epilepsi / Epilepsia ☐

Diabetes / Sokeritauti ☐ — Annet / Jokin muu: _____

Har du satt kryss ovenfor, må du spesifisere her / Tarkennus:

Tidligere jobber (legg gjerne ved en eller to arbeidsattester) (rekommendasjoner) Aikaisempi työkokemus (voit kaittaa liitteitä)

(Sted, dato, år / Paikka ja päiväys) — (Underskrift / Allekirjoitus)

Hvilket land vil du helst arbeide i? (Du må ikke velge ditt hjemland) / Mistä haluaisit mieluiten työpaikan? (HUOM! Muu kuin kotimaa)

Danmark / Tanska ☐ — Finland / Suomi ☐ — Grønland / Grönlanti ☐ — Island / Islanti ☐

Norge / Norja ☐ — Sverige / Ruotsi ☐ — Åland / Ahvenanmaa ☐

Hvilken type arbeid vil du helst ha? / Millaista työtä mieluiten haluaisit?
Sett bare kryss ved 2, og du kan gjerne prioritere dem. / Merkitse vaihtoehdot 1 ja 2)

Fabrikk, produksjon / Tehdastyö ☐ — Kontorarbeid / Toimistotyö ☐ — Butikk / Kaupallinen ala ☐ — Teknisk / Tekniset alat ☐

Lager, transport / Varasto-/kuljetusala ☐ — Restaurant, kjøkken / Ravintola-, keittiöala ☐ — Sykehus / Sairaalatyö ☐ — Annet / Muu, muka ☐

Utdannelse / Koulutus:
Grunnskole / Peruskoulu ☐ — Vdg. skole/gymnas / Lukio ☐ — Yrkes-/fagskole / Ammattikoulu ☐ — Universitet/høgskole / Yliopisto/korkeakoulu ☐

Utdannelsesretning / Opintoala: _____
(innriktning på utbildningen)

Studieår / Opiskeluvuosi: _____ — Avsluttes år / Päätösvuosi: _____

Annet / Muuta: _____

Kjørekort for bil / Ajokortti ☐ — Kjørekort for truck / Kuorma-autokortti ☐

Alder / Ikä: _____ år / v. — Høyde / Pituus: _____ cm — Kjønn: Kvinne / Nainen ☐ — Mann / Mies ☐

Språkkunnskaper / Kielitaito (understryk modersmålet / alleivivaa ædinkieli)

Dansk / Tanska ☐ — Finsk / Suomi ☐ — Islandsk / Islanti ☐ — Norsk / Norja ☐ — Svensk / Ruotsi ☐ — Engelsk / Englanti ☐ — Annet / Muu ☐

I hvilken periode kan du arbeide? / Aika jolloin olet halukas Nordjobb-työhön

Fra den _____ alkaen til den _____ asti

Ønsker du innkvartering? / Haluatko majoituksen? — Ja / Kyllä ☐ — Nei / En ☐

Hvis ja: Privat ☐ — I leilighet med andre Nordjobbere ☐ — Eget romlegen leilighet ☐
Millaisen? Yksityismajoitus ☐ yhteismajoitus muiden Nordjobbareiden kanssa ☐ — Oma huone/Oma huoneisto ☐

Ein innilig áheitan um frið

Hendan áheitanin gekk sum tann reyði tráðurin gjøgnum allar røður, sum hildnar vóru í samband við jarðarferðina hjá Olof Palme.

Leygardagin fór svenski forsætirráðharrin Olof Palme til jarðar. Stóra hátíðarhaldið í samband við jarðarferðina fór fram á Ráðhúsinum í Stokkhólm, har m.a. statsleiðarar úr eini 160 londum vóru komnir saman at siga friðartalsmanninum Olof Palme hitt seinasta farvæl.

Á hátíðarhaldinum helst fyrst núverandi forsætisráðharri Svøríkis, og eftirmaður Palmes, røðu. Hinir røðararnir vóru Carl Gustav kongur, Jarier Peres de Cuellar, ST-aðalskrivari, indiski forsætisráðharrin Rajiv Gandhi og fyrrverandi vesturtýski forsætisráðharrin Willy Brandt. Eisini helt formaðurin í ungmannafelagi javnaðarfloksins í Svøríki, Anna Lindh, røðu.

Umframt røðurnar var eisini sangur og tónleikur. Millum annað sang eitt barnakór sangin »Vi rækker vore hænder«. Kórið var sett saman av einum barni úr hvørjari av teimum 284 svensku kommununum.

Eftir hátíðarhaldið á ráðhúsinum varð kistan borin gjøgnum gøturnar í Stokkhólm til Adolf Fredriks kirkjugarðin. Palme var jarðaður nærhendis har ein av stovnarum svenska javnaðarfloksins, Hjalmar Branting, er jarðaður.

Til sjálva jarðarferðina á kirkjugarðinum vóru, eftir ynski familjunar, bert familjan og næstu vinir. Tað vóru Krister Stendahl, núverandi biskupur og Lars Carlzon, fyrrverandi biskupur, sum fyriskipaðu jarðarferðina. Krister Stendahl, biskupur talaði út frá ørindi úr fyrsta Korintarbrævinum — kallað kærleikans lóg, og nevndi Palme sum tann stóra friðartalsmannin. Hann segði, at Palme altíð hevur verið ógvuliga áhugaður fyri religiøsum viðurskiftum og hevði eisini eina stóra vitan um hesi.

Løtu eftir jarðarferðina varð kirkjugarðurin latin upp fyri almenninginum, og gingu fleiri tíggjutúsund fólk fram við grøvini hjá Palme — hvør við sínum fakli.

tór.